


www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 02 - 2013

# Oljufeløgini fáa frið

Í sambandi við at danska stjórnin hevur gjørt av at lækka partafelagsskattin úr 25 í 22 prosent, hevur hon boðað frá, at broytingin umfatar ikki oljufeløgini í Dansk Undergrunds Consortium, sum eru virkin í Norðsjónum. Tey skulu sostatt framvegis rinda tann hægra skattin. Men samstundis hevur stjórnin veitt oljufeløgunum vissu fyri, at ætlanin hjá henni at endurskoða Norðsjóvaravtaluna fer ikki at elva til, at feløgini skulu rinda meiri skatt. Tað váttar A.P. Møller-Mærsk fyri danska kringvarpinum. -Tað er rætt, at vit sleppa undan skattahækkingum hetta til 2043, sigur Louise Münther, talskvinna hjá A.P. Møller-Mærsk, við DR. Fleøgini í Dansk Undergrunds Consortium eru Shell, Chevron og A. P. Møller-Mærsk. Sambært danska kringvarpinum hava oljufeløgini frásagt sær møguleikan at fáa lægri partafelagsskatt, ímóti at tey sleppa undan skattahækkingum, tá stjórnin fer at endurskoða avtaluna við feløgini um oljuvirksemið í Norðsjónum.